# Longt sáttmálan um Sundaberg

**JFK Trol í Klaksvík hevur longt leigusáttmálan av Sundaberg við týska reiðaríið Deutsche Fisch Fang Union. Hetta merkir, at Sundaberg ikki verður aftur í føroyska flotanum í fyrru helvt av komandi ári**

FISKIVINNA

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Í summar varð Sundaberg leigaður út til eitt týskt reiðarí. Boðini tá vóru, at trolarin ikki kom aftur til Føroya fyrr enn móti árslok.



*Sundaberg verður útleigaður alla fyrru helvt av komandi ári eisini. Hetta merkir tó ikki, at manningin er uppsøgd, sigur stjórin á JFK Trol, Hanus Hansen*

Nú er greitt, at Sundaberg ikki kemur aftur nú, sum annars varð sagt. Leigusáttmálin millum JFK Trol og týska reiðaríið Deutsche Fisch Fang Union, sum heldur til í Cuxhaven, er longdur. Hanus Hansen, stjóri í JFK Trol sigur, at júst dagfestingin fyri, nær leigusáttmálin gongur út er ikki ásett, men hann væntar, at trolarin verður útleigaður alla fyrru hálvu av 2005.

Søgur hava gingið um, at manningin á Sundabergi er uppsøgd av somu orsøk, men hesum vísir Hanus Hansen staðiliga aftur.

Av teimum 18 umborð á Sundaberg í dag eru 15 føroyingar. Hinir sleppa sambært stjóranum á JFK Trol við ávíkavist Skálaberg og Sjúrðarberg.

– Vit vilja sjálvsagt sleppa undan at siga nøkrum upp, og vit vilja seta allar menninar í sving umborð á hinum báðum trolarunum, sigur Hanus Hansen og leggur afturat, at longdi sáttmálin við DFFU kemur reiðarínum væl við, nú kvotan í Barentshavinum er minkað til komandi ár.

# Skrímslið fingið Dimmalimm-virðislønina




**Barnabókin »Nei! segði lítla skrímsl«, ið Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út í summar, hevur fingið íslendsku Dimmalimm-virðislønina**

VIRÐISLØN

Í grundgevingini at lata bókini Dimmalimm-virðislønina verður sagt, at dómararnir leitaðu eftir myndum, sum í myndamáli leggja nakað aftrat tekstinum, ið aftur kunnu eggja hugflogið hjá unga lesaranum og økja sosiala tilvitið. Hetta funnu teir í tekningunum í Nei! segði lítla skrímsl. Myndamálið hjá Áslaug Jónsdóttir er bæði stórfingið og skemtiligt og er væl í samsvari við støddina á bókini, har samspælið millum mynd, tekst og rúm á síðunum er óvæntað og spennandi. Boðskapurin í bókini er umráðandi uttan at vera áleypandi.

Nei! segði lítla skrímsl er vorðin til í samstarvi ímillum teir tríggjar rithøvundarnar Kalle Güettler, Rakel Helmsdal og Áslaug Jónsdóttir eftir eina verkstovu á Álandi fyri norðurlendskar barnabókahøvundar og teknarar í 2001. Áslaug Jónsdóttir hevur teknað og tað er hon sum hevur fingið "Dimmalimm-Islendsku myndskreytiverdlaunin". Virðislønin verður latin á hvørjum ári fyri bestu tekningarnar í barna- og ungdómsbókum í Íslandi. Bókin kom út tíðliga í summar í Føroyum, Danmark, Íslandi og Svøríki.

Umframt virðislønina hevur bókin fingið nógv góð ummæli í bløðum uttanlands.

Sum heitið sipar til, er bókin um eitt djarvt lítið skrímsl. Stóra skrímsl kemur at vitja lítla skrímsl, men lítla skrímsl torir ikki at lata upp, tí tað ræðist stóra skrímsl, sum stjelur, flennir at lítla skrímsli og skal altíð ráða. Ein dagin vendist í holuni, tí tá fær lítla skímsl samlað sær so mikið av dirvi, at tað torir at siga NEI!





Lívið er ljóst og vakurt. Brádliga hendir tað, og alt broytist.

Onki er so virðismikið sum lívið og ein góð heilsa. Ein vanlukkutrygging tekur hond um tað dýrabarasta, vit eiga.

Hjá børnum fevnir tryggingin eisini um ymiskar barnasjúkur.

Tú kanst tryggja teg alt samdøgrið ella í frítíðini.

Tryggingin kann nýtast aðrastaðni enn í Føroyum. Tú kanst fara út í allan heim við henni.

Velur tú eina vanlukkutrygging, kunnu vit hjálpa tær fíggjarliga. Tryggingin er eitt trygdarnet fyri teg og alla familjuna, og ein íløga í framtíðina.

Ring til okkara á tel 345600 ella far inn á www.trygging.fo og fá nærri at vita, hvussu vit kunnu hjálpa tær.

**Tilboð í desember**

Allan desember mánað hevur Tryggingarfelagið Føroyar eitt tilboð, ið gevur foreldrum møguleika at tekna privata vanlukkutrygging, íroknað barnavanlukkutrygging, har fyrsta ársgjaldið er fyri hálvan prís!

Tí er ikki at bíða, men at tryggja børnini væl, so tey altíð eru "trygg á leiðini", hvar tey so eru og hvat tey so gera – alt samdøgrið!

**Gjaldið bara hálvt gjald fyrsta árið!**

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

*- so ert tú tryggari*